# ítróttur

Nr. 51 • týsdagur • 15. mars 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

## Tjaldur-VÍF útsettur

Dysturin, sum skuldi verða millum Tjaldur og VÍF í Sunset-kappingini sunnudagin, bleiv útsettur orsaka av vánaliga veðrinum sunnudagin.

Tað var ikki hildið ráðiligt, at kvinnurnar hjá VÌF skuldu fara í bili úr Vestmanna til Runavíkar í vánaligu koyrilíkindunum, sum vóru sunnudagin, og tí samdust feløgini um, at dysturin skuldi útsetast til mikukvøldið.

**-tn**

Søljan-VB 20-32

# VB vann á Giljanesi

**Leygardagin var dystur í Sunset-kappingini á Giljanesi, har Søljan fekk vitjan av VB**

SUNSET-KAPPINGIN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*VB-kvinnnurnar eru aftur á odda í Sunset-kappingini, eftir at tær um vikuskiftið fingu tveir tryggar sigrar til høldar*

Ein dystur var í Sunset-kappingini leygardagin. Tá spældi annað av oddaliðunum, VB, tann fyrra av sínum báðum dystum norðanfjørðs um vikuskiftið. Tá ið liðini herfyri hittust í Vági, var talan um ein sera spennandi dyst, har avgerðin ikki fall fyrr enn í seinastu løtu.

### Sær gott út hjá VB

Leygardagin var tó ongin ivi um, hvat var betra liðið. VB hevði munin allan dystin, og sigurin hjá gestunum var ongantíð í vanda. Endaliga úrslitið av dystinum var 32-20 til gestirnar úr Vági, sum tykjast verða sera væl fyri í løtuni, og tað er ikki so galið, tí hetta er óivað rætta tíðspunktið at raka toppformin.

Havandi í huga, at VB eisini vann stórsigur á Skála sunnudagin, so kann ikki sigast annað, enn at tað sær gott út hjá vágskvinnum. Tær liggja ájavnar við Stjørnuna í stigum, og enn eru tveir innanhýsis dystir eftir at leika millum tey bæði oddaliðini, so einki er avgjørt. Men vinnur VB toppdystin í Vági komandi leygardag móti júst Stjørnuni, so bendir alt á, at gullið endar í Vági í ár.

Tað er einki sum bendir á, at nakað av hinum liðunum fer at taka stig frá hvørki VB ella Stjørnuni í ár. Tískil verða tað áðurnevndu innanhýsis uppgerðirnar, ið verða avgerandi. Tá ið havt verður í huga, at VB er nærum 100 mál framman fyri Stjørnuna í málmuni, so kann ikki sigast annað, enn at tað sær gott út hjá VB.

**Søljan-VB 20-32 (12-18)**
**Søljan:** Nicoleta Radu Hansen 6 (1), Lina Andriulyte 5, Kristianna Petersen 3, Hertha Jónsdóttir Simonsen 3, Petra Thomassen 2, Heidi Maria Akselsen 1 (1).
**VB:** Daiva Tuomaite 9 (2), Aukse Vysniaskaite 9 (5), Laila Jespersen 5, Rannvá Augustinussen 3, Christina Holm 3, Sólrun Krosslá 2, Arnleyð Hjelm 1.
**Brotskøst:** Søljan 6(2), VB 13(7)
**Útvísingar:** Søljan 4, VB 2
**Dómarar:** Dánjal Samuelsen & Heri Petersen

StÍF-VB 18-42(7-19):

# Enn ein stórsigur til VB

**Vágskvinnur vunnu sunnudagin enn ein stórsigur, tá ið tær vitjaðu StÍF inni á Skála**

SUNSET-KAPPINGIN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

VB gjørdi eitt gott hál, tá ið tær um vikuskiftið vitjaðu norðanfjørðs. Fýra stig og 36 mál í yvirskot er ikki so galið, og vágskvinnur hava nú tikið oddasessin frá Stjørnuni.

### Smurdu StÍF av

Eftir at VB leygardagin hevði verið í Vágum og bast Søljuni, var túrurin sunnudagin komin til StÍF á Skála. Hesaferð var mótstøðan nakað lakari, enn hon hevði verið í Vágum, og tað sást eisini aftur. VB snøgt sagt smurdi heimaliðið av, og tað var longu frá fyrsta bríksli, at veruligi munurin sást á liðunum báðum.

VB legði beinan vegin sjógv millum seg og heimaliðið. StÍF megnaði at javna til 1-1, men so mistu tær sambandið við gestirnar. VB legði seg á odda 8-1, áðrenn StÍF aftur megnaði at skora, og leiðslan hjá vágskvinnum bara vaks og vaks.

At tað er stórur munur á teimum fremstu liðunum og niðaru liðunum í Sunset-kappingini, var enn einaferð staðiliga prógvað, og VB undirstrikaði enn einferð, at tær eru eitt gott boð upp á ein møguligan FM-vinnara.

Dysturin sunnudagin var beinan vegin avgjørdur, men hetta hevði ikki við sær, at vágskvinnur tóku sær av løttum, tí tær koyrdu á at kalla allan dystin. Hetta sást eisini aftur á máltalvuni, har hálvleiksleiðslan hjá VB var ikki minni enn 19-7.

Í seinna hálvleik var gongdin hin sama. VB skoraði nærum eftir vild, og munurin bara vaks. Tá ið avtornaði, vísti máltalvan, at oddaliðið hevði vunnið ein 42-18 stórsigur, og harvið tikið oddasessin frá Stjørnuni, tí at VB hevur nógv betur málmun.

Komandi leygardag verður so toppdystur í Vági, tá ið Stjørnan kemur suður á vitjan, og tað er neyvan ov nógv sagt, at vinnur VB tann dystin, so er meistaraheitið at kalla teirra.

**StÍF-VB 18-42(7-19)**
**StÍF:** Paula B. Høgnesen 6, Rebekka Justinussen 4, Poula Olsen 4, Malan Petersen 1, Rósa Johansen 1, Bára B. Danielsen 1, Súnfríð B. Jacobsen 1(1)
**VB:** Daiva Tomaite 14(2), Sólrun Krosslá 7, Aukse Vysniaskaite 7(1), Rannvá Augustinussen 6, Laila Jespersen 4, Margreth Augustinussen 1, Christina Holm 1, Jacoba Poulsen 1, Jóna Thorsteinsson 1(1)
**Brotskøst:** StÍF 1(1), VB 5(4)
**Útvísingar:** StÍF 1, VB 2
**Dómarar:** Kári og Dánial Hansen